# Rækjuvirkið á Oyri

## við tilhoyrandi bygningum til sølu




Talan er um fleiri bygningseindir, m. a. er framleiðsluhøll til skeljaframleiðslu íroknað skrivstovuhølir og starvsfólkarúm, framleiðsluhøll til rækjuúrdráttir og høll við uml. 6.000 m3 frostgoymslu. Samlað gólvvídd er uml. 3.626 fermetrar.

Harumframt eru eini sethús, gólvvídd uml. 255 fermetrar og smiðjubygningur íroknað fólkarúm, samanbygdur við garasju til trukkar, gólvvídd uml. 400 fermetrar, somuleiðis er pláss fyri framhaldandi útbyggingum.

Møguleiki er at keypa alt undir einum ella einstakar partar. Eisini er møguleiki at gera leiguavtalu fyri verandi virksemi.

Bygningarnir lúka heilsufrøðilig krøv, væl egnaðir til góðsking av aliúrdráttum, pelagiskum fiski t. v. s. alla matvøruframleiðslu við høgum heilsufrøðsligum krøvum.

Bygningseindirnar eru allar í góðum standi, ongar átrokandi ábøtur eru neyðugar. Liggja á ídnaðarøki / havnaøki við kajkanti á Oyri, ið er ein djúphavn soleiðis, at stór skip kunnu leggja at. Øll uttanumøkir eru javnað og stoypt / asfalterað.

Bygningarnir liggja sera væl fyri í miðstaðarøkinum, sami teigur annahvørt tú kemur av Skálafjørðinum, úr Klaksvík, úr Vágum ella úr Havnini.

Ognirnar verða seldar um hóskandi boð verður givið!

P/F inni • Niels Finsens Gøta 37
P.O. Box 364 • FO-110 Tórshavn
inni@inni.fo • Tlf. 35 42 00 • Fax 35 42 01

inni

Atlanticon CONSULTING

## Umhvørvissamskipari til norðurlendska verkætlan

Søkt verður eftir einum samskipara til norðurlendsku umhvørvisverkætlanina EMS light-Nordic.

EMS light-Nordic verkætlanin er ein norðurlendsk verkætlan, sum miðjar ímóti at stuðla burðardyggari menning í teim smáu samfeløgunum í norðurlondum. Verkætlanin fer fram í Føroyum, Íslandi og Álandsoyggjunum og er grundað á eitt tætt samstarv millum virkir, feløg og umhvørvismyndugleikar.
Fleiri upplýsingar á www.ems-light.org

Til at loysa uppgávuna á nøktandi hátt fær samskiparin fakligan stuðul bæði frá innanhýsis ráðgevum hjá Atlanticon og hjá okkara samstarvspartnarum í útlandinum.

**Førleikar**

- Viðkomandi útbúgving frá hægri læristovni.
- Duga enskt í skrift og talu.
- Duga at leggja ein boðskap fram.
- Góður førleiki innan KT er ein fyrimunir.

Starvið er tíðaravmarkað í 6 mánaðar, men møguleiki er fyri at halda áfram við øðrum uppgávum fyri Atlanticon.
Tann, sum settur verður skal kunna taka aðar uppgávur hjá felagnum.
Løn eftir avtalu.
Umsøkjarar, sum júst eru lidnir við at lesa eru eisini vælkomnir at søkja.

Umsóknin skal vera Atlanticon í hendi í seinasta lagi 15. september 2008.

Nærri kunning fæst við at venda sær til Atlanticon.

Bryggjubakki 4 • Tórshavn • Tlf. 319685 • atlanticon@atlanticon.fo • www.atlanticon.fo

# Skráin fyri Rás 2

## Fríggjadagur 29. august

07:00 Tónleikur
08:00 Føroyar mítt land
08:05 Bilradio – Magnus Gunnarsson er vertur.
09:00 Føroyar mítt land
09:05 Morgunsendingin – Um Fjarðafestivalin o.a. Mirjam Pætursdóttur og Eyðfinn Drewsen leggja til rættis.
10:00 Morgunsendingin – Um Fjarðafestivalin o.a. Framhald
11:00 Tíðindi
11:10 Morgunsendingin – Um Fjarðafestivalin o.a. Framhald
12:00 Tíðindi
12:15 Hitt-tónleikur
13:00 Seinnapartsending – Um Fjarðafestivalin o.a. Mirjam Pætursdóttur og Eyðfinn Drewsen leggja til rættis
15:00 Tíðindi
15:10 Ynskiløtan
16:00 Tíðindi
16:05 Ynskiløtan
17:00 Tíðindi
17:15 Tónleikur
18:30 Tíðindi (e)
18:45 Tónleikur
19:00 Seinnapartsending (endursending) – Um Fjarðafestivalin o.a. Framhald
21:00 Úr Skjáttuni – Sending hjá Heimamissiónini
22:00 Føroyar mítt land
22:05 Tónleikur
23:00 Føroyar mítt land
23:05 Tónleikur
00:00 Liðugt

## Leygardagur 30. august

07:00 Tónleikur
11:00 Vespureiðrið (e)
12:00 Tónleikur
13:00 Bilradio (e) – Maggi Gunnarsson er vertur
14:00 Tónleikur
21:00 Halleluja – Heine Lützen ella Andrew Djurhuus leggja til rættis.
22:00 Tónleikur
00:00 Liðugt

## Sunnudagur 31. august

07:00 Gospel tónleikur
10:00 Úr skjáttuni (e) – Samrøða við Maureen Clarke, trúboðara í Norðurafrika. Frants Jensen leggur til rættis.
11:00 Tónleikur
11:30 Á Torginum (e) – Absalon Absalonsen er vertur.
13:00 Føroyar mítt land – Sendingar úr vikuni, ið fer. Janus Mohr leggur til rættis
13:40 Tónleikur
14:00 Lysingar
14:05 Tónleikur
15:00 Lýsingar
15:05 Tónleikur
17:00 3. Hálvleikur – Heri Simonsen er vertur
18:30 Tónleikur
20:00 Reflex (e) – Ungdómssending hjá Heimamissiónini
21:00 Tónleikur
00:00 Liðugt

### Bilradio – leygardagin kl. 13.00

Í sendingini hesaferð eru flestu innsløgini um Trucker Festivalin, sum verður í Klaksvík vikuskiftinum.

Vit práta við Marna Berg, lastbilaeigara, Dáva Winther, leiðara á Mentanardeildini hjá Klaksvíkar býráð, og við fyrireikararnar av Trucker Festivalinum, Leif Eliasen og Hugo Skorastein.

Í biltíðindunum hoyra vit m.a. um eina framsýning á Danmarks Industrimuseum, sum er ein søgulig gjøgnumgongd av teimum bilunum sum hava verið gjørdir í Danmark í meira enn hundrað ár.

### Úr Skjáttuni – í kvøld kl. 21.00

Samrøða við Maureen Clarke, trúboðara í Norðurafrika. Maureen hevur saman við manninum Christopher og børnunum, Jóseph og Lauru, verið trúboðari í arabiskum landum í níggju ár. Familjan er heima á vitjan í løtuni, og vit hoyra tey greiða frá um arbeiðið. Frants Jensen leggur til rættis.

RÁS ...títt radio